# Løgtingstíðindi

# 1980

**Bind A**

Løgtingsmál

TÓRSHAVN 1982

## LØGTINGSMÁL Í NUMMARRØÐ


| Løgtings-<br>mál nr. | | bls. |
|---|---|---|
| | Ólavsøkutingið 1980 | 1 |
| | Tingnevndir | 4 |
| | Frágreiðing frá løgmanni 1980 | 6 |
| 1. | Lækkan av almennum rentum | 27 |
| 2. | Fyrispurningar til Heðin Klein, landsstýrismann | 29 |
| 3. | Veðhald fyri lánum til keyp av bussum til koyring av ávísum rutum | 31 |
| 4. | Broyting í løgtingslóg um menningargrunn fyri ídnað, handverk og tænastufyritøkur | 33 |
| 5. | Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin | 35 |
| 6. | Lærlingaviðurskifti | 38 |
| 7. | Eykafíggjarløgtingslóg 1979/80 | 43 |
| 8. | Binding av avskrivaðum peningi | 66 |
| 9. | Vegurin Miðvág-Sørvág | 67 |
| 10. | Broyting í skipanini millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1980 | 68 |
| 11. | Skattan av útlendingum, ið arbeiða í Føroyum í stytri tíð | 73 |
| 12. | Broyting í skattalógini | 74 |
| 13. | Skattligir frádráttir hjá føroyskum sjómonnum undir donsku sjómansskattaskipanini | 75 |
| 14. | Vetrarsiglingin hjá m/s «Smyril» | 76 |
| 15. | Upployising av løgtinginum | 77 |
| | Vetrartingsetan 1980 | 81 |
| | Val av løgmanni og landsstýrismonnum | 85 |
| | Nývál av formansskapi | 85 |
| | Tingnevndir | 86 |
| | Nývál av tingnevndum | 87 |
| 1. | Val av álitismonnum og nevndum | 92 |
| 2. | Lán til jarðargrunnin | 92 |
| 3. | Broyting í lógini um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum | 94 |
| 4. | Fyrispurningur til Vilhelm Johannesen, landsstýrismann | 99 |
| 5. | Veðhald fyri lánum til fiskiskip og fiskavirkir | 101 |
| 6. | Veðhald fyri láni til fiskamjøl v.m. á goymslu | 103 |

7. Fíggjarløgtingslóg 1981/82 ........ 104
8. Partapeningur til fiskavirkið á Tvøroyri ........ 133
9. Landsstýrismál ........ 137
10. Veðhald fyri láni til Interkommunala renovatiónsfelagsskapin ........ 138
11. Skipan millum Føroyar og Sovjetsamveldið um sínámillum fiskirættindi í 1981 ........ 142
12. Stuðul til bygging av deild av Føroya Handilsskúla í Tórshavn ........ 146
13. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann ........ 150
14. Kanningar hvussu nógv ungfólk millum 16 og 18 ár eru uttan lønað arbeiði 152
15. Broyting í løgtingslóg um inntøkuskatt av rentum av innistandandi peningi ........ 154
16. Brennistudningur til pensiónistar og stakar uppihaldarar ........ 157
17. Stuðul til bjálving av húsum hjá pensiónistum ........ 161
18. Endurgjald til fólk, ið koma fyri skaða av brotsverkum ........ 164
19. Fyrispurningur til løgmann ........ 166
20. Val av 6-mannanevnd til samráðingar við Ísland og Grønland ........ 169
21. Landskassin setur partapening í felag at rokja millumlandasigling ........ 173
22. Uppafturtøka av veiðu í grønlendskum sjógvi ........ 181
23. Broyting í happadráttarlógini ........ 183
24. Broyting í løgtingslóg um føroysku kommunurnar ........ 184
25. Eykastuðul til bygging av tekniskum skúla í Klaksvík ........ 189
26. Skipan millum Føroyar og EEC um sínámillum fiskirættindi í 1981 ........ 192
27. Fígging av arbeiði móti alkoholmisnýtslu, fyribyrging og hjálp ........ 198
28. Hjálp til loysn av íbúðartørvinum ........ 202
29. Staðfesting av øllum orðaskiftum og málsviðgerðum á Føroya Løgtingi ..z206
30. Veðhald fyri láni til Føroya Ídnaðargrunn ........ 209
31. Uppskot viðv. rammusáttmálanum við EEC og heimastýrislógini ........ 212
32. Almenn forsorgarhjálp ........ 219
33. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann ........ 221
34. Veðhald fyri rakstrarláni til framleiðslu úr svartkjafti ........ 223
35. Broyting í lógunum um almenna forsorg, fólka-, avlamis- og einkjupensjón v. m. ........ 225
36. Vegagerð í samband við tunnilgerð á Kunoynni og samband millum Kunoynna og Borðoynna ........ 227
37. Fyrispurningur til Páll Vang, landsstýrismann ........ 231
38. Uppskot til samtyktar viðvíkjandi stýrisskipanarlógini ........ 233
39. Samráðingar við NATO ........ 234
40. Grannskoðan av roknskapinum hjá Strandfaraskipum Landsins fyri fíggjarárini 1978/79 og 1979/80 ........ 236
41. Lán til Telefonverk Føroya Løgtings ........ 252
42. Loyvi til fiskifør heimahoyrandi í Týska Demokratiska Lýðveldinum (DDR) til at veiða svartkjaft á sjóøki Føroya 1981 ........ 256

43. Broyting í myndingalógini ........ 260
44. Veðhald fyri láni til Mjólkarvirki Búnaðarmanna ........ 263
45. Veiting av ríkisborgararætti ........ 265
46. Veiting av ríkisborgararætti ........ 266
47. Ríkislóg um «ophævelse af lov om ændringer i gebyrerne for kongelige bevillinger m. v.» ........ 267
48. Skipan millum Føroyar og Noreg um sínámillum fiskirættindi í 1981 ........ 268
49. Ríkislóg um «statens uddannelsesstøtte» ........ 271
50. Broyting í logtingslóg um tekning av partapeningi í P/f Føroya Mekaniska Grótídnað ........ 272
51. Sínámillum fiskirættindi Føroyar - Ísland ........ 275
52. Skipan um sínámillum fiskiskap í 1981 Føroyar og Svoríki ........ 277
53. Fyrispurningur til Olaf Olsen, landsstýrismann ........ 278
54. Broyting í stuðulsskipanini til fiskivinnuna ........ 280
55. Broyting í lógini um innkrevjing av uppihaldspeningi ........ 305
56. Broyting í lóg um rættarstøðu hjá børnum ........ 307
57. Kgl. fyriskipan um «embedslæge institutioner m. v.» ........ 308
58. Fyrispurningur til Eilif Samuelsen, landsstýrismann ........ 313
59. Lóg um sosialar eindir ........ 320
60. Veðhald fyri láni til Nordafar A/S ........ 322
61. Broyting í treytunum fyri láni til Telefonverk Føroya Løgtings ........ 324
62. Ferðafrádráttur o. a. ........ 325
63. Avdráttir í skatti fyri neyðuga koyring til arbeiðis ........ 327
64. Broyting í logtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, skatting av bráðfeingis búgvandi ........ 328
65. Lán til landskassan ........ 332
66. Lán til framhald av vega- og bergholsarbeiði í Kallsoynni ........ 335
67. Um tingsið ........ 336
68. Veðhald fyri láni til Føroya Jarðarráð ........ 338
69. Veðhald fyri láni til Húsalánsgrunnin ........ 341
70. Veðhald fyri láni til SEV ........ 344
71. Stuðul til bygging av farmaskipum ........ 347
72. Vegir og lendingar ........ 354
73. Lóg um millumlanda menningararbeiði ........ 367
74. Millumlanda sáttmáli um avmarking av statsleysum persónum ........ 368
75. Broyting í patentlógini ........ 369
76. Studningur til Klaksvíkar, Runavíkar, Vestmanna og Porkeris kommunur til byggibúning o.a.t. av grundøkjum á landsøkjum havnanna ........ 371

# 10. Veðhald fyri láni til Interkommunala renovatiónsfelagsskapin

Ár 1980, mikudagin 17. december legði Heðin Klein, landsstýrismaður, vegna landsstýrið, fram soljóðandi

Uppskot
til

*løgtingslóg um veðhald fyri láni til Interkommunala Renovatións felagsskapin.*

§ 1. Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin til bygging av brennistøð.

§ 2. Henda lóg fær gildi beinanvegin.

*lagtingslov om kaution for lån til Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin.*

§ 1. Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at kautionere for lån til Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin til opførelse af en forbrændingsanstalt.

§ 2. Denne lov træder i kraft straks.

*Viðmerkingar:*

Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin hevur søkt um landskassaveðhald fyri neyðugum lánum til bygging av ruskbrennistøð.

Ætlanin er at byggja eina brennistøð, ið kann brenna ruskið frá øllum landinum. Støðin er mett at kosta (í 1980 prísum):

| | | |
|---|---|---|
| Byggibúning | kr. | 1.900.000,— |
| Bygningar | kr. | 9.700.000,— |
| Ovnar og onnur maskinútgerð | kr. | 10.700.000,— |
| Ymist | kr. | 1.900.000,— |
| Projektering og fyrisiting | kr. | 2.600.000,— |
| Óvæntaðar útreiðslur | kr. | 3.000.000,— |
| Tilsamans | kr. | 29.800.000,— |

Talan er um ein 3 tons brenniovn, nóg stórur eisini at taka ruskið frá teimum kommununum, ið ikki nú eru limir.

Íløgurnar verða allar fíggjaðar við lántoku.

Kommunurnar hava tikið seg saman í renovatiónsfelagsskapin fyri í felag at fáa eina skynsama loysn á renovatiónsmálinum. Allar kommunur kunnu gerast limir í hesum felagsskapi, og allar kommunur eru limir uttan hesar: Tórshavn, Tórshavnar uttanbíggja, Kirkjubøar, Hest, Porkeri, Skúvoy, Skopun, Mykines, Saksun, Mikladalur, Fugloy og Svínoy.

Íbúgvaratalið í limakommununum er nú 28.102, men roknar felagsskapurin við, at fleiri kommunur gerast limir seinri.

Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin er skipaður sum eitt lutafelag, har limakommunurnar eru ognarar í mun til íbúgvaratalið.

Lutaeigararnir hava ikki ábyrgd fyri lánum felagsskapsins, men binda seg at rinda felagnum limagjald eftir hesum reglum:

Limirnir gjalda á konto hvønn mánað, undantikið apríl og december, 1/10 av metta árliga limagjaldinum, soleiðis, sum hetta er ásett í fíggjarætlan felagsskapsins. Tá ið roknskaparárið er farið, verður limagjaldið endaliga regulerað.

Sostatt er talan um eitt lutafelag, har lutaeigararnir eftir tí samtyktu fíggjarætlanini binda seg at gjalda rakstrarhallið, lutað uppá limirnar í mun til íbúgvaratalið. Endaliga limagjaldið verður ásett, tá roknskaparúrslitið fyriliggur.

Limakommunurnar kunnu ikki siga limaskapin upp fyrr enn tær hava verið lutaeigarar í 10 ár.

Landsstýrið hevur samráðst við nevndina fyri felagsskapin og heitt á nevndina um at fáa broytt lógir felagsins soleiðis, at limakommunurnar borga fyri upptikin lán. Nevndin hevur á fundi 15. december 1980 samtykt á komandi aðalfundi at seta uppskot fram og viðmæla sum nýtt 2. og 3. stk. í § 4 í lógunum fylgjandi:

«Lutaeigararnir borga pro rata — í mun til íbúgvaratalið — fyri tær árligu útreiðslur til rentur og avgjøld av møguligum lánum felagsins.

Fer lutaeigari burtur úr felagnum, verður hann av hesi orsøk ikki leysur av skyldu síni sambært § 4, stk. 2, fyrrenn tey lán, sum upptikin eru, meðan hesin var limur, eru fult goldin.»

Sum treyt fyri veðhaldinum er landsstýrið sinnað at krevja, at ognirnar verða settar í veð fyri lánið.

Upplýst er fyri landsstýrinum, at felagið roknar við at fáa byggiloyvi í Nes kommunu.

Hesi skjøl eru viðløgd:

1. Lógir felagsins,
2. Yvirlit dagf. 15. december 1980.
3. Notat dagf. 9. september 1980.

1. viðgerð 27. januar. Málið varð beint í fíggjarnevndina, sum 31. mars legði fram soljóðandi

## Álit

Málið varð lagt fram av undanfarna landsstýrinum tann 17. december 1980 og undir 1. viðgerð tann 27. januar 1981 beint í fíggjarnevndina.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini er núsitandi landsstýrið spurt, um tað hevði nakrar viðmerkingar til fyriliggjandi mál, men tað hevði landsstýrið ikki.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið hevur landsstýrið sagt frá, at tað hevur samráðst við nevndina fyri felagsskapin og heitt á nevndina um at fáa broytt lógir felagsns soleiðis, at limakommunurnar borga fyri upptikin lán. Nevndin hevur á fundi 15. december 1980 samtykt á komandi aðalfundi at seta uppskot fram og viðmæla sum nýtt 2. og 3. stk. í § 4 í lógunum fylgjandi:

»Lutaeigararnir borga pro rata — í mun til íbúgvaratalið — fyri tær árligu útreiðslur til rentur og avgjøld av møguligum lánum felagsins.

Fer lutaeigari burtur úr felagnum, verður hann av hesi orsøk ikki leysur av skyldu síni sambært § 4, stk. 2, fyrrenn tey lán, sum upptikin eru, meðan hesin var limur, eru fult goldin.«

Sum treyt fyri veðhaldinum er landsstýrið sinnað at krevja, at ognirnar verða settar í veð fyri láninum.

Treytað av at nevndu broytingar tilskilaðar sum nýtt 2. og 3. stk. í § 4 verða gjørdar, tekur meirilutin (Ivan Johannesen, Jørgen Thomsen, Ove Mikkelsen, Óssur Dam Jacobsen, Annfinn Kallsberg og Frederik Olsen) undir við uppskoti landsstýrisins, meðan minnilutin (Adolf V. Hansen) ikki kann taka undir við uppskotinum av fylgjandi orsøkum:

1. Einki fyrilit verður tikið til lokal mótmælir um staðið, har brennistøðin skal liggja.
2. Málið er ov illa undirbygt.
3. ⅓ av Føroya fólki er enn ikki limur í renovatiónsfelagsskapinum og
4. sami ⅓ umhugsar nú av nýggjum at gerast limur.

Minnilutin ynskir málið meira nágreiniliga kannað, og serstakliga nú, tá orka er vorðin ein ovur stórur partur av okkara innflutningi. Allir møguleikar fyri orkuinnflutningssparandi tiltøkum og íløgum eiga at verða gjølla kannað.

Skotið verður tí upp at senda fylgjandi spurning til kanning og ummæli hjá Orkuráðnum, SEV og einum útlendskum ráðgevandi felag/stovni:

Um stovnsett verður eitt dampturbinu elverk, ið drivið verður við koli og olju,

og sum eisini kann brenna tað avfall, sum renovatiónirnar savna saman, hvønn týdning fær eitt tílíkt el-verk fyri

a) landsbúskapin?
b) el-prísin?

Út frá hesum setur minnilutin fram fylgjandi

Uppskot
til
*samtyktar.*

Álagt verður landsstýrinum at senda Orkuráðnum, SEV og einum útlendskum ráðgevandi felag/stovni omanfyri nevnda spurning um eitt dampturbinu el-verk.

2. apríl løgdu tinglimirnir Erlendur Patursson, Karin Kjølbro, Ove Mikkelsen og Petur Reinert fram soljóðandi

Uppskot
til
*samtyktar.*

Málið verður sent landsstýrinum til gjølligari kanningar.

2. viðgerð 2. apríl. Lógaruppskotið § 1 samtykt við 23—0, § 2 uttan atkvøðugreiðslu. Uppskotið til samtyktar frá Erlendi Patursson o.fl. fall við 6—0. Uppskotið til samtyktar frá Adolf Hansen fall við 2—0.

3. viðgerð 6. apríl. Uppskotið samtykt við 25—1 atkvøðum.

F.L. j. nr. 899-25. Lóg nr. 29 frá 5. mai 1981.

*Sí skjal 4 A — C.*